

KRINGVARP FØROYA

# Ársfrágreiðing
2022

# Kringvarpið er til fyri allar føroyingar

Vit taka tey mál upp, sum hava týdning fyri teg. Tí eru vit fremsti mentanarberi føroyinga. Endamálið hjá Kringvarpi Føroya er at veita eina public service-tænastu, sum savnar, undirheldur og ríkar.

# Innihald


| | |
|---|---|
| Formæli | 4 |
| Framleiðsla | 5 |
| Álit | 9 |
| Aktuelt | 13 |
| Ítróttur | 18 |
| Mentan | 20 |
| Átrúnaður | 29 |
| Ungdómurin | 31 |
| Børn | 33 |
| Tónleikur | 36 |
| SavnsGull | 38 |
| Public Service | 39 |





**Kringvarp Føroya**
**Ársfrágreiðing 2022**

Forsíðumynd
Bjarni Árting Rubeksen

Myndir
Bjarni Árting Rubeksen
og egnar myndir

Uppseting
Guðrið Syderbø

# Kringvarpið skal styrkjast!



Soleiðis stóð at lesa í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn stutt fyri árslok. Hetta vóru av sonnum góð tíðindi. Kringvarpið hevur í fleiri umførum víst á tørvin á eini prístalsjavning, tí trýstið á játtanina – kringvarpsgjaldið – økist, tá prísir og lønir hækka.

Tað er ein sannroynd, at Kringvarpið kann ikki dúva upp á kringvarpsgjaldið aleina. Inntøkurnar frá Gekkinum minkaðu av álvara í 2021. Broytingar vóru gjørdar, tá Gekkurin fylti 25 ár í februar mánaði í fjør. Átøkini eydnaðust, og inntøkurnar vuksu aftur. Gongdin vísti enn einaferð, at raksturin er viðbrekin, tá hann er tongdur at sveigginum í einum eydnuspæli. Tí hevur ætlanin hjá landsstýrinum so stóran týdning.

Ætlanin gevur vón um ein miðlapolitikk, sum byggir á framsøknan mentanarpolitikk. Á ráðstevnuni "Miðlar á vegamóti", sum Kringvarpið skipaði fyri saman við Dimmalætting, Norðlýsinum og Sosialinum, kom fram, at yvir 100 størv eru horvin í føroyska miðlalandslagnum tey seinastu 15 árini. Samstundis hevur ovurstóra útboðið frá tøknirisunum broytt miðlavanarnar. Tá vit brúka minni tíð upp á føroyskar miðlar, verður minni kjakast um føroyska samfelagið og mentanina. Føroyska savningarmegin kann tískil vikna. Tí eigur ikki bara Kringvarpið, men alt tað føroyska miðlalandslagið, at styrkjast.

### Framleidnið veksur støðugt

Aftan á spariumfarið í 2021 vaks talið av føroyskum senditímum aftur í 2022. Árið var hendingaríkt. Fólkatingsval og løgtingsval komu hvørt eftir annað, og hetta setti dám á allan stovnin. Dag og vikustudio beiv endurnýggjað fyri at fáa meira burtur úr útbúnaðinum. Partur av løgtingsvalkvøldinum var sent úr Norðurlandahúsinum, sum gav valsendingini virðiligar karmar.

Russiska álopið á Ukraina merkti tíðindaflutningin í fjør. Kringvarpið hevði beinleiðis frásagnir úr Póllandi um stóra flóttafólkastreymin úr krígsherjaða landinum. Ein dokumentarur um ukrainsku flóttafólkini í Froðba var sendur nýliga.

Nýggja dokumentareindin á Aktuelt gjørdi av at framleiða í alt fimm sjónvarpsdokumentarar og eina poddvarpsrøð í 2022. Onnur nýbrot vóru eisini. Kringvarpið var samframleiðari av krimi-sendirøðini TROM, sum bleiv stroymd kring stórar partar av heiminum. BIIT-verkætlanin, sum skal fáa tey ungu at geva Kringvarpinum ans, sendi frá finaluni í tónleikakappingini Sement. Gentuvesið fekk Ársins miðlaheiðursløn frá LGBT+ Føroyar, tí BIIT-sendirøðin rúmar fjølbroytni, opinleika og ymisleika. Barnarøðin "Seks spurningar um at vera menniskja" breyt við sínum heimsspekiligu hugmyndum upp úr nýggjum.

Kringvarpið sendir hondbóltslandystirnar hjá kvinnum og monnum, nú bæði liðini standa á gáttini til altjóða frambrot. Dokumentarrøðin um rithøvundan og menniskjað William Heinesen var ein av mongum dokumentaravrikum í fjør. Millum onnur vóru lýsingin av fólkatingsvalstríðnum hjá Onnu Falkenberg og søgan um tey, sum noyddust at flyta til Danmarkar undan kreppuni í nítiárunum.

Kringvarpið skal varpa sendingar á góðum, føroyskum máli. Nýggi málpolitikkurin kom í gildi í fjør, og hann javnsetur málið við onnur fak í Kringvarpinum. Málslig umboð eru sett á øllum deildum. Arbeiðið við at nútímansgera tónleikapolitikkin hjá Kringvarpinum er byrjað. Fimta árið á rað var meira enn helvtin av tónleikinum í útvarpinum av føroyskum uppruna.

### Álit á framtíðini

Álitið kvinkaði eitt vet uppeftir í fjør; 77 prosent hava stórt ella nokk so stórt álit á Kringvarpi Føroya. Hetta líkist myndini úr hinum Norðurlondunum, har álitið á public service-rásunum eisini er stórt. Álit er ikki einans tongt at innihaldi, men eisini at savningarmegi og miðlavanum. Ávirkanin frá tøknirisunum er stór. Kringvarpið arbeiðir tí støðugt við at menna talgildu pallarnar. Vit mugu røkka føroyingum, har teir eru.

Álit er eisini tongt at einum public service-sáttmala. Tað hevur týdning, at myndugleikarnir og Kringvarpið taka lógvatak saman um ein framsøknan sáttmála, sum tryggjar góðar sendingar til allar føroyingar. Tað er okkara vón, at hetta hendir í 2023.

Við ynskjum um eitt gott ár fyri Kringvarp Føroya og brúkarar tess.

**Ivan Hentze Niclasen,**
**kringvarpsstjóri**



# Framleiðsla

# Framleiðsluyvirlit

Yvirlitið vísir einans føroyska framleiðslu.
Bólkarnir fevna um hesar sendingar:

**Aktuelt**
Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, tíðindafundir, stuttdokumentarar og Breddin.

**Tónleikasendingar**
Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

**Infotainment**
Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði “information” og “entertainment”. Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Góðan Morgun Føroyar, sendingin Vikuskiftið, Ólavsøku-prát, Gekkurin, Summargestir o.l.

**Børn og ung**
Barnaútvarpið, allar barnasendingar í sjónvarpinum, og ungdómssendingar, eitt nú Gentuvesið og Biit.

**Átrúnaður**
Morgunlestrar, andaktir, gudstænastur, møti og sendingin Credo.

**Mentan**
Mentanarsendingar, Ljóarin, siðsøga (t.d. Meg Minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórði á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar hóskvøld, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

**Ítróttur**
Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskiftunum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingina: Tingvarpið í sjónvarpinum.

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 764 | 150 | 914 |
| Tónleikasendingar | 4.586 | 22 | 4.608 |
| Infotainment | 1.169 | 39 | 1.208 |
| Børn/ung | 392 | 150 | 542 |
| Átrúnaður | 370 | 72 | 442 |
| Mentan | 1.407 | 126 | 1.533 |
| Ítróttur | 187 | 119 | 306 |
| **Samanlagt** | **8.875** | **678** | **9.553** |

Yvirlitið vísir einans føroyska framleiðslu

## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til útvarpið



## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til sjónvarpið



# Álit



# Álitisbarometrið

Síðani februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað, hvussu tað stendur til við áliti føroyinga til Kringvarp Føroya og aðrar føroyskar miðlar. Álit er ein av fortreytunum fyri tilverurættinum hjá Kringvarpinum, og hetta er nakað, sum stovnurin arbeiðir miðvíst við at varðveita og betra.

500 fólk í aldursbólkunum 18-29, 30-44, 45-59 og 60-80 ár í øllum landinum verða sostatt regluliga biðin um at meta um, hvussu stórt álit tey hava á føroyskum tíðindamiðlum sum heild og á Kringvarpinum. Tílíkar spurnakanningar skulu altíð takast við ávísum fyrivarni, tó kunnu afturvendandi spurnakanningar sum hesar geva nakrar góðar ábendingar.

Í 2022 var leisturin at máta álitið tillagaður nakað. Frá 2016 til 2021 hevur svarstigin verið 1-7, men í 2022 vóru svarmøguleikarnir minkaðir niður í 4: Stórt álit, Nokk so stórt álit, Ikki serliga stórt álit og Onki álit. Hetta er fyri at fáa meira eftirfarandi tøl og fyri at flokka eftir sama stiga sum í altjóða kanningum. Eisini verður spurt, hvar svargevarnir meta seg vera politiskt á høgra-/vinstra-ásinum og um útbúgving. Broytingin í kanningarleistinum gevur greiðari ábendingar um álit føroyinga á Kringvarpinum.

Álitið er kannað 24 ferðir, og í 2022 var álitið støðugt vaksandi gjøgnum árið.

Talvurnar niðanfyri vísa ávikavist álitið á Kringvarpinum í januar, juni og september 2022 og nýtsluna av Kringvarpinum í januar, juni og september 2022.

## Álitisbarometrið

# Hvussu stór álit hevur tú á upplýsingum, sum koma frá Kringvarpi Føroya / kvf.fo?



## Álitisbarometrið

# Hvussu ofta brúkar tú Kringvarp Føroya / kvf.fo?



# Aktuelt



# Tvey val og kríggj í Europa

Vit kundu anda lættan í 2022, tá umræður avmarkingar vegna koronufarsóttina. Tiltøkini avmarkaðu okkum ikki longur. Men vit fingu stórar avbjóðingar móti ársenda, tá fólkatingsval og løgtingsval komu hvørt eftir annað, so nógv virksemi á Aktuelt meira ella minni var lagt í dvala seinastu mánaðirnar undan ársskiftinum.

Kríggið í Ukraina fylti eisini nógv í farna ári, og vit gjørdu eina roynd at koma so nær krígnum sum gjørligt. Vit valdu eisini at endurnýggja Dag og vikusjónvarpsstovuna, Studio 2, og fáa meira burtur úr tí útbúnaði, sum húsið eigur, og sum eisini leiddi okkum langt á leið í sambandi við valini.

## Sjónvarp

Longu í 2019 fóru vit undir at broyta Dag og viku innihaldsliga, og tað merkti eisini broytingar í Studio 2, har Dagur og vika verður framleidd. Endamálið var at samansjóða tíðindapartin og tann meira perspektiverandi partin, og hetta er framvegis útgangsstøðið. Vit fingu tá ein nýggjan stóran skerm inn í studio og valdu at varðveita ein vegg við níggju smærri sjónvørpum, sum saman myndaðu ein størri skerm.

Hesir smáu skermarnir vóru rættiliga gamlir, og eisini tilknýtta útgerðin, og í 2022 gekk hesin parturin fyri. Tað var næstan vónleyst at fáa eykalutir, og tað hevði eisini kostað lutfalsliga nógv. Vit valdu tí at hugsa studio-partin helt av nýggjum og estetiskt samansjóða útsjóndina – hetta skuldi eisini geva okkum heilt nýggjar møguleikar, millum annað í sambandi við valsendingar.

Avgjørt var at seta ein nýggjan stóran skerm upp, so vit fingu tveir eins skermar, sum eru væl egnaðir til grafikkin, sum í alt størri mun myndar Dag og viku. Hetta var skermur, sum vit áttu frammanundan, og hevði verið brúktur til serligar framleiðslur í Studio 1 (útvarpshøllini) og uttan fyri húsið. Hesa ferð valdu vit eisini at seta ein arkitekt at tekna alt frá grundini av, so vit fingu eina fullfíggjaða verkætlan. Avgjørt var eisini at fara frá stabbunum til eitt størri vertsborð, sum kann flytast og skapa nýggj rúm og gera alt meira fleksibult. Borðið er eisini soleiðis háttað, at tað kann stillast í hædd, og tí er eisini møguleiki at hava perspektiverandi samrøður sitandi.

Nýggja Studio 2 var veruliga tikið í nýtslu til fólkatingsvalið, har báðir teir stóru skermarnir komu til sín rætt við grafikkinum. Formansumfarið var eisini hildið í Studio 2. Til løgtingsvalið vóru báðir skermarnir eisini brúktir til fulnar, men formansumfarið var tá flutt í Norðurlandahúsið.

### Stutt-dokumentarar

Sum nevnt í ársfrágreiðingini í 2021 fóru vit tá undir at menna stutt-dokumentararnar, sum alt eftir vavi og innihaldi kunnu leggjast inn í Dag og viku ella sendast sum serstakir dokumentarar aftaná. Fyri at fáa framleiðslurnar betri skipaðar, er ein dokumentareind skipað, sum redakatørarnir manna upp á skift. Hesi taka støðu til, hvørjar framleiðslur skulu setast í verk og tilnevna eisini ein redaktør. Dokumentareindin ger eisini av, um framleiðast skal til sjónvarp, útvarp ella poddvarp. Í fjør gjørdi dokumentareindin av at framleiða fýra sjónvarpsdokumentarar, eina poddvarpsrøð og at senda journalist og fotograf til Póllands í sambandi við kríggið í Ukraina.

**· Radaramálið**

Málið um radaran á Sornfelli fylti nógv í 2022 og gjørdist ikki minni áhugavert, tá Russland leyp á Ukraina 17. februar. Stutt áðrenn innrásina var ein temasending gjørd um radaramálið sum partur av eini longdari Degi og viku. Sendingin um sjálvan radaran vardi í 45 minuttir og tíðindasendingin í 15 minuttir. Vit høvdu millum annað samrøðu við fyrrverandi NATO-aðalskrivaran, Anders Fogh Rasmussen, umframt fólk við servitan á økinum. Millum innsløgini var kjak í sjónvarpsstovuni og ymisk faktuell viðurskifti løgd fram. Hetta var ein nýggjur háttur at framleiða, sum vit helst fara at taka uppaftur.

**· Hilton á almennum veingjum**

Í mars mánaði byrjaði kanningararbeiðið, sum endaði við sendingini "Hilton á almennum veingjum" í mai mánaði. Privata hotellvinnan er ørkymlað, tí tey eru í beinleiðis kapping við almenna føroyska flogfelagið, Atlantsflog, um at fáa fatur í útlendsku ferðafólkunum, sum nú aftur seta kós ímóti Føroyum. Atlantsflog eigur týðandi ognarpart í hotellinum Hilton Garden Inn. Hetta hevur elvt til undran, tí hvat eigur Atlantsflog at blanda seg uppí, og hvørjum skal tað halda seg burtur frá? Sendingin vardi í 35 minuttir.



**· Fosturtøka á breddan**

5. juli settu vit fosturtøku á breddan í einum longri innslagi í Degi og viku. Hetta var ein stutt-dokumentarur upp á 15 minuttir, sum hóskaði at senda sum part av Degi og viku. Talan er um eitt sera viðkvæmt evni at viðgera, og í sendingini sluppu allir partar sakliga at greiða frá sínum sjónarmiðum, eins og vanligar mannagongdir í sambandi við fosturtøku í Føroyum vóru lýstar. Hetta innslagið var ætlað at leggja botn undir eitt meira sakligt orðaskifti, sum annars hevur verið merkt av ógvusligum skuldsetingum báðar vegir.

**· Flóttafólk á markinum**

Tá kríggið brast á í Ukraina, fóru vit beinanvegin at kanna møguleikan at senda fólk á staðið. Tað gjørdist okkum tó skjótt greitt, at hetta var ein næstan vónleys uppgáva. Við tryggingum, keyp av útgerð og øðrum, gjørdist hetta ein alt ov stór uppgáva hjá okkum. Vit fingu frænir av, at ein føroysk/ukrainsk familja ætlaði sær til Póllands at taka ímóti næstringum, sum ætlaðu sær at flýggja undan krígnum. Tá tað var vón-leyst at senda inn í krígsherjaða landið, gjørdi dokumentareindin av í staðin at senda journalist og myndafólk til Póllands saman við føroysku/ukrainsku familjuni at taka ímóti flóttafólkunum. Vit fylgdu teimum úr Føroyum til pólskan bý, har familjan var sameind. Samstundis fekk føroyski hyggjarin innlit í ógvusliga flóttafólkastreymin við føroyskum eygum. Í Degi og viku 7. mars var stórt tema um kríggið og ferðina sum flóttafólk úr Ukraina til Føroya. Sent var eisini beinleiðis úr Póllandi.

**· Ukrainsk flóttafólk**

So skjótt sum Russland gjørdi innrás í Ukraina, tók spurningurin um flóttafólk seg upp, eisini í Føroyum. Lógarverk var smíðað, so tað var smid-ligari at taka ímóti flóttafólkum. Tað uppskotið var liðugt í apríl. Nøkur vóru komin til landið áðrenn og høvdu familjutilknýti til Føroyar, men tey fyrstu, ið komu uttan at hava nakað tilknýti, komu í mars mánaði 2022. Hesi fólk fingu innivist á Tvøroyri, og vit valdu at fylgja hesum ukrainum yvir eitt longri tíðarskeið, og ein sending skuldi helst vera klár at senda, tá eitt ár var farið. Tað arbeiðið er í gongd.

## Útvarp

Tíðindini í útvarpinum eru av alstórum týdningi og skulu støðugt kunna føroyingar um, hvat hendir í samfelagnum, so tey eru før fyri at luttaka í einum upplýstum kjaki. Vit hava nakrar stuttar tíðinda-sendingar fyri at fylgja við aktuellu støðuni og so tvær longri sendingar á miðdegi og á nátturða.

Breddin er nú sum áður ein føst redaktión við trimum fólkum, sum fara meira í dýpdina við nøkrum fáum evnum fýra dagar um vikuna – týsdag, mikudag, hósdag og fríggjadag. Breddin byrjaði í 2019, og smáar tillagingar eru gjørdar síðan. Breddin hevur funnið sína legu millum klokkan tíggju og ellivu, so hann eisini kann fóðra tíðindasendingina á døgurða og á nátturða.

Aktuelt hevur sett sær fyri at framleiða fleiri doku-mentarar, og í tí sambandinum var ein dokumentar-eind sett á stovn undir Breddanum í 2022. Hetta var gjørt fyri at skipa tilgongdina til dokumentarar betri enn áður. Eindin er mannað við trimum føstum limum, sum eru ávíkavist tíðindaleiðarin, ein tog-haldari og umboð fyri netpartin. Aftur at hesum koma trý fólk, sum umboða redaktørar í útvarpi og sjónvarpi, sum sita eitt hálvt ár, áðrenn skift verður út. Eingin kann áleggja fólki at gera dokumentarar, men fyrst og fremst skulu fólk við hugskotum leggja sínar ætlanir fram fyri eindina, sum so tekur støðu til, hvat skal gerast og útnevnir ein redaktør til hvørja sending.

Allir dokumentararnir, sum vóru framleiddir í 2022, vóru gjørdir við útgangsstøði í dokumentareindini. Talan var um fimm sjónvarpsframleiðslur, sum eisini fingu netið sum pall.

Ein poddvarpsrøð var eisini framleidd í 2022, "Ein granni ger innrás", sum snúði seg um russisku innrásina í Ukraina. Røðin var í fýra pørtum og send sum partur av Breddanum og samstundis løgd út á netið. Farið var aftur um støðuna, so fólk veruliga kundu seta seg inn í forsøguna til innrásina. Sendingarnar vóru ein hálvan tíma til longdar.

## Ítróttur

Ítróttaredaktiónin ger eina vikuliga ítróttasjónvarpssending, 3-2, mánakvøld kl. 19.30 og ítróttatíðindi til Dag og viku hóskvøld. Kappróður verður sendur beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi. Í útvarpssendingini "Bólturin" er beinleiðis frásøgn frá bestu mansdeildini í fótbólti. Í Fótbóltspráti hvønn mánadag verður fótbólturin um vikuskiftið eisini greinaður nærri.

Ein av nýggju avbjóðingunum í ítróttinum er, at talið av beinleiðis sjónvarpsframleiðslum økist støðugt. Nógv hevur verið gjørt við landsliðsfótbólt, men avgerð er tikin um eisini at framleiða og senda landsdystir hjá kvinnum og monnum í hondbólti. Hetta gevur eitt økt arbeiðstrýst, men eisini nógvar spennandi uppgávur, sum okkara hyggjarar eru glaðir fyri.

## Sendingar tvørtur um pallar

2021 var avbjóðandi vegna korona, men 2022 skuldi vera árið, har vit skuldu royna okkum við fleiri kjakfundum kring landið. Vit hava roynt okkum við fiskivinnutingi á Torradøgunum í Klaksvík og Heystfagnaði á Eiði. Hesir fundir hava áskoðarar, men vit bjóða eisini lurtarunum við á heimasíðuni, har til ber at seta spurningar. Av ymiskum orsøkum var bara framleiðsla av Torradøgunum. Vit valdu sama leist sum seinast, og tiltakið eydnaðist væl.

Tá Heystfagnaðurin skuldi setast á skrá, kom tíverri eitt fólkatingsval, og tað forpurraði ætlanina. Men vit hava funnið ein leist, har vit kenna okkum rættiliga trygg, og vónandi kunnu vit útbyggja við fleiri tílíkum kring landið á ymiskum pallum.

## Heimasíða og sosialir miðlar

Vit hava sett okkum fyri at menna heimasíðuna og sosialu miðlarnar munandi. Vit settu eina ætlan á skinnarar í 2020, men hon var darvað av koronu. Í 2021 kom gongd á, og menningararbeiðið helt fram í 2022.

At fáa framleiðslurnar til brúkararnar á ein meira einfaldan hátt er eisini í menning. At kalla allar støðir kring okkum leggja seg alt meira eftir at røkka brúkarunum umvegis appir, so fólk umvegis fartelefon kunnu velja, hvørjum tey vilja hyggja og lurta eftir. Kringvarpið er eisini farið undir at menna eina tílíka app. Tann fyrsta er til barnaøkið, men sum frálíður, skulu tær eisini framleiðast til sjónvarp og ljóð.

Vit mugu staðfesta, at heimasíðan er vorðin ein nógv meira týðandi partur í tíðindaflutninginum hjá Kringvarpi Føroya, og hon verður frameftir ein drívandi megi, tá framleiðslurnar skulu røkka brúkarunum.

## Fólkatings- og løgtingsval

Seinni partur av árinum var nógv merktur av, at bæði fólkatings- og løgtingsval vóru við stuttum millumbili.

### Fólkatingsval

Vit vóru vitandi um, at fólkatingsval kundi verða skrivað út, nær tað skuldi vera eftir summarsteðgin, og vit høvdu longu lagt ein leist áðrenn summarsteðgin. 5. oktober skrivaði forsætisráðharrin val út at vera 1. november í Danmark – valdagurin í Føroyum var síðan broyttur til 31. oktober.

Vit høvdu júst umvælt sjónvarpsstovuna, har tað eisini var lagt upp fyri einum vali. Ein stórur skíggi var settur upp afturat, og hann kom veruliga til sín rætt í sambandi við nógva valgrafikkin. Vit framleiddu eisini formansumfarið í nýggju sjónvarpsstovuni, sum ætlanin alla tíðina hevði verið, tá arbeiðið fór í gongd.

At skipa fyri einum vali er ómetaliga tíðarkrevjandi og krevur nógv av starvsfólkunum í ein heilan mánað, tá at kalla alt annað virksemi, uttan kjarnuvirksemið, verður steðgað.

Breddin var niðurlagdur, og fólkini har brúktu orkuna at framleiða seks valfundir kring landið og seks Andglettar, har tvey umboð fyri hvønn flokk svaraðu spurningum frá okkara journalistum. Valfundirnir vóru skipaðir í SMS og annars á miðnámsskúlum kring landið.

Allar hesar framleiðslurnar vóru um morgunin, tá Breddin annars var á skrá, og so endursendar um kvøldið. Tað nýggja hesa ferð var, at allar framleiðslurnar vóru sendar í útvarpinum, stroymdar á netinum og síðan endursendar í sjónvarpinum um kvøldið eftir Dag og viku. Dagin fyri valið var skipað fyri einum størri valfundi í Løkshøll, sum vardi í tveir tímar og var sendur beinleiðis.






Skipað var fyri valkvøldinum í sjálvum Kringvarpinum, har flokkarnir eisini sendu síni umboð. Endabresturin var formansumfar í sjónvarpsstovuni. Vit høvdu fólk kring landið hetta kvøldið, sum bæði sendu innsløg til valkvøldið og vóru á beinleiðis. Vit vóru í Høllini á Hálsi í Havn, Suðuroynni, Klaksvík, Eysturoynni, Vágum og Streymoynni. Ein serlig redaktión tók móti øllum tilfari og gjørdi so av, á hvørjum palli, tilfarið skuldi sendast, antin á netinum ella í sjónvarpinum.

Mentanardeildin tók sær av útvarpspartinum og sendi allan dagin, og um kvøldið var serlig valsending í útvarpinum í Studio 3.

**Løgtingsval**

Tað gekk ikki long tíð, so skrivaði løgmaður val út til Løgtingið. Fólk vóru nóg illa komin fyri seg, áðrenn farið var undir fyrireikingarnar til løgtingsvalið – og tað var ein munandi størri framleiðsla enn fólkatingsvalið. Løgmaður skrivaði valið út 9. november, bert eina viku eftir fólkatingsvalið, at vera 8. desember.

Vit fylgdu nøkulunda sama leisti sum til Fólkatingsvalið, men skráin var bygd munandi út, bæði hvat viðvíkti sendingunum áðrenn valið, men eisini sjálvt valkvøldið.

Útvarpið skipaði fyri Tinginum, har flokkarnir møttu við tveimum umboðum at svara fyri sínum politikki. Útvarpið hevði eisini fýra valfundir kring landið á trimum miðnámsskúlum og á Fróðskaparsetrinum. Hesar sendingar vóru allar sendar millum klokkan 10 og 11 um morgunin, tá Breddin annars hevði verið sendur. Sendingarnar vóru aftur sendar í útvarpinum og stroymdar beinleiðis á netinum.

Sjónvarpið skipaði fyri sjey Andglettum við teimum sjey forfólkunum. Sjónvarpið stóð eisini fyri trimum stórum valfundinum í Lívdini í Havn, Salt á Tvøroyri og á Skúlatrøð í Klaksvík, sum eisini var tann størsti og longsti fundurin, ið eisini hevði eitt formansumfar. Hesir vóru allir sjónvarpaðir – teir báðir fyrstu millum klokkan 19 og 21, meðan tann seinasti var sendur millum klokkan 19.30 og 21.45.

Sjálvt valkvøldið var skipað øðrvísi hesa ferð, og Norðurlandahúsið gjørdist partur av stóru sendingini.

Aftur hesa ferð tók Mentan sær av valinum í útvarpinum valdagin. GMF og Ljóarin høvdu valið sum evni, inntil sjónvarpið tók við klokkan 19. Fimm sjónvarpslið vóru kring landið, sum gjørdu innsløg um dagin klár at senda um kvøldið, og sum eisini sendu beinleiðis av valstøðum og úr økjunum annars.

Høvuðssjónvarpsstovan var í Sortudíki, Studio 2, og í Norðurlandahúsinum. Í Studio 2 vóru úrslitini kunngjørd og greinað við grafikki á teimum stóru skermunum, og allar beinleiðis samrøður kring landið vóru har. Umframt høvuðsvertin var eisini ein greinari í Studio 2, eins og tveir valserfrøðingar, sum stóðu fyri og greiddu frá forsøgnunum.

Í Norðurlandahúsinum var eisini ein vertur og greinari, sum fóru meira í smálutir við teimum ymisku úrslitunum. Meðan vit áður hava havt umboð fyri flokkarnar í sjálvum kringvarpshúsinum, so vóru hesi umboð savnað í Norðurlandahúsinum. Tveir journalistar vóru á gólvinum og fingu viðmerkingar frá politikarum og øðrum. Valkvøldið endaði við einum forfólkaumfari í Norðurlandahúsinum.

Valkvøldið var sostatt ein nógv størri framleiðsla enn til fólkatingsvalið, men eisini munandi størri enn til seinasta løgtingsval.

# Ítróttur



# Ítróttaframleiðslur

## Ítróttur í sjónvarpinum

### Januar

| | |
|---|---|
| 14.-16. | Hondbóltur, A-menn<br>– Føroyar-Luksemburg<br>– Italia og Lettlandi |
| 30. | Estetiskur fimleikur<br>– 1. steypakapping<br>(stroymd, 1 kamera) |

### Februar

| | |
|---|---|
| 4.-5. | ÍSF-ítróttafagnaðurin |
| 19.-20. | Hondbóltur, menn<br>– Steypafinala |
| | Hondbóltur, kvinnur<br>– H71, Europa Cup |
| 25.-26 | Flogbóltur<br>– Steypafinalur |

### Mars

| | |
|---|---|
| 2. og 5. | Hondbóltur, A-kvinnur<br>– Føroyar-Eysturríki<br>– Eysturríki-Føroyar |
| 5. | Estetiskur fimleikur<br>– 2. steypakapping<br>(stroymd, 1 kamera) |
| 19. | Hondbóltur, kvinnur<br>– Steypafinala |

### Apríl

| | |
|---|---|
| 8. | Fótbóltur, A-kvinnur<br>– Ungarn-Føroyar |
| 13.-16. | Hondbóltur, A-menn<br>– Týskland-Føroyar<br>– Føroyar-Týskland |
| 20.-23. | Hondbóltur, A-kvinnur<br>– Føroyar-Rumenia<br>– Danmark-Føroyar |

### Mai

| | |
|---|---|
| 8. | Estetiskur fimleiki<br>– HM (stroymd, 1 kamera) |
| 14. | Stóri FM-dagurin/Kontrast |
| 28. | Kappróður<br>– Norðoyastevna |

### Juni

| | |
|---|---|
| 4. | Fótbóltur, A-menn<br>– Turkaland-Føroyar |
| 7. | Fótbóltur, A-menn<br>– Føroyar-Luksemburg |
| 11. | Fótbóltur, A-menn<br>– Føroyar-Litava |
| | Kappróður<br>– Eystanstevna (stroymdur) |
| 14. | Fótbóltur, A-menn<br>– Luksemburg-Føroyar |
| 18. | Kappróður<br>– Sundalagsstevna |
| 25. | Kappróður<br>– Jóansøka |

### Juli

| | |
|---|---|
| 9. | Kappróður<br>– Fjarðastevna |
| 7.-18. | Hondbóltur, U20-menn<br>– HM-endaspæl, uml. 6 dystir |
| 16. | Kappróður<br>– Vestanstevna |
| 28. | Kappróður<br>– Ólavsøka |

### September

| | |
|---|---|
| 22. | Fótbóltur, A-menn<br>– Litava-Føroyar |
| 25. | Fótbóltur, A-menn<br>– Føroyar-Turkaland |

### Oktober

| | |
|---|---|
| 3.-11. | Fótbóltur, A-kvinnur<br>– Baltic Cup venj. Tveir dystir<br>(stroymdir uttan frásøgn) |
| 12. | Hondbóltur, A-menn<br>– Ukraina-Føroyar |
| 16. | Hondbóltur, A-menn<br>– Føroyar-Eysturríki |
| 29. | Fótbóltur, menn og kvinnur<br>– Steypafinalur |

### November

| | |
|---|---|
| 3.-5. | Hondbóltur, A-kvinnur<br>– Kosovo-Føroyar x 2 |
| 16. | Fótbóltur, A-menn<br>– Kekkia-Føroyar |
| 19. | Fótbóltur, A-menn<br>– Kosovo-Føroyar |

# Mentan





# Mentan í 2022

Aftur í ár hava starvsfólk og fríyrkisfólk á Mentan framleitt útvarps- og sjónvarpssendingar, sum hava savnað føroyingar á merkis- og hátíðardøgum, umframt gjørt sendingar og tilfar, sum hava skapt kjak, undirhildið og upplýst. Talan er um barnasendingar, mentan, átrúnað, tónleik, dokumentarsendingar og mangt annað, eins væl og talan er um afturvendandi sendingar og nýggjar framleiðslur. Felagsnevnarin fyri skránna er, at hon er fjølbroytt og lýsir og viðger føroyska samfelagið við public service-sáttmálanum sum grundarsteini, og vit byrja við at lýsa nakað av tí, ið sjónvarpið hevur gjørt og sent av mentanarligum tilfari.

# Sjónvarp

**TROM**

Spenningurin var stórur á midnátt 16. februar, tá allir seks partarnir av røðini TROM gjørdust tøkir á kvf.fo – og aftaná eisini vóru vístir í sjónvarpinum. Kringvarpið hevur stuðlað røðini fíggjarliga og hevur eisini latið útgerð, starvsfólk og høli til framleiðsluna.

TROM er nýbrot í føroyskari sjónvarpssøgu, sum eisini er víst á eitt nú Viaplay í Norðurlondum, ZDF/Arte í Týsklandi og Frankaríki, BBC4 í Onglandi og Roku Channel í USA við 80 milliónum hyggjarum.

TROM byggir á bøkurnar hjá Jógvani Isaksen, og tað er Torfinnur Jákupsson, ið eigur hugskotið og hevur skrivað TROM. Hannis Martinsson er garvaður, gravandi journalistur, sum ferðast aftur til Føroya, haðani hann er ættaður, tí ein kvinna, ið sigur seg vera dóttir hansara, heldur seg vera í lívsvanda. Skjótt fær Hannis Martinsson frænir av, at álvarsom brotsverk verða framd, tí Sonja á Heyggi, sum er aktivistur og djóraverndarfólk, brádliga er horvin undir sera illgrunasomum umstøðum.

TROM gjørdist Ársins vinnuátak her heima, men hevur eisini vunnið altjóða viðurkenning. Røðin fekk Jury Special Prize á Monte Carlo Television Festival, og var eisini í uppskoti til Eddan í Íslandi og TV Prisen í Danmark.

## Dokumentarsendingar

**William**

Á páskum sendi Kringvarpið røðina “William”. Eitt stórverk um lív og virki William Heinesens. William er tann navnframasti føroyski rithøvundurin í útlondum. Skaldskapur hansara er týddur til fleiri enn tjúgu ymisk mál, hann var heiðraður við fleiri bókmentaprísum og var eisini í uppskoti til bókmentaheiðursløn Nobels. Men William var ikki bara rithøvundur. Hann teknaði og málaði, klipti og smíðaði tónleik.

Røðin um William Heinesen er ein ferð gjøgnum lív Williams, um skaldið, listamannin og menniskjað.

Suni Merkistein og Hans Petur Hansen gjørdu sendingina.

### Spískamarið

Væl umtókta matsendirøðin við Gutta Winther, Spískamarið, var aftur á skránni á heysti 2022. Hesa ferð snúði tað seg um landbúnað. Í fýra sendingum vitjaði Spískamarið bø og garðar kring Føroyar fyri at kanna, hvussu alt byrjaði, hvussu tað gongur í dag, og hvussu framtíðin fer at síggja út. Í fyrsta partinum er kúgvin í fokus, og verður hugt nærri at stóra týdninginum, sum kúgvin hevur havt upp gjøgnum tíðirnar. Vitjað verður eisini á Heystfagnaðinum, í Veltuni á Sandi og á Trøllanesi, har Gutti fleygar gamlan havhest.

Spískamarið var sent fyri fyrstu ferð í 2012, røðin legði dent á góðu rávørurnar, sum finnast í føroysku náttúruni, og fyrsti partur var í Saksun. Lagt til rættis: Gutti Winther og Pætur Dahl.

### Anna og arvurin

Valstríðið hjá Onnu Falkenberg byrjaði longu fleiri mánaðir, áðrenn val var útskrivað, tá hon og abbin kunngjørdu í felags skrivi, at annar gevst, og hin ætlar at yvirtaka sessin. Í sendingini fylgja vit Onnu Falkenberg frá einum av seinastu arbeiðsdøgunum sum ráðgevi fyri abban á Christiansborg til valkvøldið, tá úrslitið er greitt, og sessurin fer í arv. Finnur Koba og Hans Petur Hansen gjørdu sendingina.

### Sofía og djórini

Sofía Thorsvig-Kajsdóttir rýmdi heim aftur til Føroya, tá korona brast á. Hon hevur nú funnið friðin í Elduvík, har hon hevur bygt ein djóragarð við hønum, dunnum, gásum og kalkunum. Djóragarðurin er á trøðni, sum familjan eigur longur frammi í dalinum – einar 100 metrar frá bygdini. Hvønn morgun, hvønn seinnapart og hvørt kvøld vitjar Sofía djórini. Oftast hevur hon báðar hundarnar við sær. Djórini fylgja Sofíu trúføst, tá hon gongur oman eftir trøðni at geva teimum. Finnur Koba og Eyðun Müller Thomsen gjørdu sendingina.

### Flóttafólk

Tey villu 80ini endaðu við einum braki 6. oktober 1992, tá Sjóvinnubankin var endurreistur av donsku stjórnini, og Føroyar vóru settar undir umsiting. Í fleiri ár valdaði djúp kreppa í Føroyum, sum rak túsundtals familjur av landinum. Í stuttrøðini ‘Flóttafólk’ hitta vit fleiri av teimum, sum vóru hart rakt í kreppuárunum. Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup Hansen gjørdu sendingina.

### FMA

FMA var sent fyri níggjundu ferð. Talan var um beinleiðis sending úr Norðurlandahúsinum, har føroyskur tónleikur var fagnaður við framførslum og virðislønum. Eisini vóru fleiri bandað innsløg gjørd til sjálva sendingina, har tónleikarar vóru tiknir á bóli við virðislønum. Marianna Winther Nagata og Rólant Waag Dam vóru vertir, Lív Mortensen framleiðari.

### Lyst

Mentanarsending, ið varpar ljós á aktuella listapallin. Vit lýsa listarlig viðurskifti og listafólk, ið gera um seg í samfelagnum. Finnur Koba er vertur í sendingini, sum átta partar vóru sendir av í 2022.

Tilsamans 54 partar av Lyst eru gjørdir og sendir í Kringvarpi Føroya, síðani fyrsti partur var sendur í 2018.





**Foytar greyðir**

Fyrsti partur av Foytum greyðum var sendur millum jólanna. Foytar greyðir er ein matsending, har Tróndur Vatnhamar og Kári Sólstein gera mat eftir uppskriftum í føroyskum kókibókum. Umframt at halda til í køkinum, har teir kóka, steikja og baka, so ferðast teir eisini runt landið og gera mat saman við ymiskum fólkum. Ein løtt og undirhaldandi matsending.

**10-mannaførini 2021**

Havnarbáturin, Ormurin Langi og Klaksvíkingur. Hesin stuttfilmur er tikin upp í juli 2021 og vísir á venjingar umborð og á rógvarar, sum fortelja sínar søgur. Um samanhald og gleði, um at vinna og at tapa. Bara tvey brot úr tveimum stevnum eru í filminum.Hugskot og framleiðsla: Edmund S. Jacobsen.

**Dreymurin um eitt hondbóltslív**

Í Føroyum íðka 2.200 fólk hondbólt, og alsamt fleiri spælarar fara uttanlands at royna hondbóltseydnuna. Tveir teirra eru 19 ára gamla Rakul Wardum og 16 ára gamli Óli Mittún. Rakul fór longu sum 16 ára gomul niður á Skanderborg Elite Håndboldakademi og spælir nú við Ajax í Keypmannahavn, og Óli Mittún skrivaði í mars í ár undir sáttmála við svenska meistaraliðið Sävehoff. Í sendingini greiða tey frá sínum dreymum um framtíðina og umrøða eisini tann longsul, sum kann gera um seg, tá ungfólk flyta burtur. Uni Arge legði til rættis, og Mathias Dimon Næs setti saman.

**Olaf & trappan**

Olaf Haldansen hevur gjørt næstan 400 trappur í sínum 92 ára gamla lívi. Í summar bað timburmaðurin Kristen Johansen hann um at hjálpa sær við at gera eina trappu afturat. Hesin dokumentarurin fylgir tilgongdini, frá at trappan verður smíðað á verkstaðnum í Vestmanna, til hon verður sett upp í húsunum í Leynum. Finnur Koba og Eyðun Müller Thomsen gjørdu sendingina.

**Guðrun & Guðrun**

Barbara Lervig var við Guðruni Rógvadóttir og Guðruni Ludvig í Jordan og fekk eitt innlit í, hvussu føroysku sniðgevararnir í Guðrun & Guðrun arbeiða. Eisini verður hugt nærri at verkætlanini Woman´s Empowerment Project, sum snýr seg um, at kvinnur skulu vera førar fyri at lívbjarga sær. Filmað og klipt hevur Barbara Lervig.

**Brimið í heiminum**

Brimheim verður spæld á BBC, í týskum útvarpi og á øllum teimum stóru donsku útvarpsrásunum. Roskilde Festivalurin bílegði hana at spæla í 2021, og hon verður mett millum mest lovandi tónleikabólkarnar í Danmark. Men hvør er Helena Heinesen Rebensdorff, kvinnan aftan fyri Brimheim, og hví er hon so væl umtókt? Vit fylgdu Helenu, tá tað av álvara fór at brima í tónlistarligu tilveru hennara og fyrsta heildarútgávan var fyri framman. Lagt til rættis og klipt Rólant Waag Dam. Filmað og klipt Jónfinn Stenberg.

**Trom – aftur um leiktjøldini**

Sjónvarpsrøðin Trom er fyrsta stóra sjónvarpsrøðin, ið er filmað í Føroyum. Vit fara aftur um leiktjøldini og síggja, hvussu upptøkurnar vóru gjørdar og tosa við rithøvund, leikstjórar, leikarar og onnur um røðina TROM. Kári Sólstein og Hans Petur Hansen hava lagt sendingina til rættis.

**Mjadnabørn**

Jógvan Andrias var trý ára gamal, tá hann var sendur einsamallur niður til Danmarkar at fáa viðgerð fyri mjadnasjúku. Jónsvein var fimm ára gamal, tá hann fekk staðfest mjadnasjúku og var sendur til Danmarkar. Viðgerðin var at liggja bundin í eini song við beininum í strekk í tvey ár. Árini í donsku sjúkrahússongini langt frá heimliga umhvørvinum settu djúp spor, sum merktu mjadnabørnini fyri lívið. Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup Hansen gjørdu sendingina.



### Við Jógvani á túri

Við rithøvundinum Jógvani Isaksen sum ferðaleiðara eru vit á rundferð í havnargøtum – í slóðum Hannis Martinssonar. Jógvan hevur skrivað krimibøkurnar um blaðmannin og uppdagaran Hannis Martinsson, sum filmsrøðin Trom er grundað á. Jógvan Isaksen er føddur og uppvaksin í Havn og leiðir okkum hagar, sum vit í søgunum hitta Hannis. Jógvan Isaksen hevur búð í Danmark meginpartin av ævi síni, men heimbýurin Havnin er pallurin, ið flest allar hansara søgur fara fram. Lagt til rættis: Suni Merkistein. Filmað og klipt: Jónfinn Stenberg.

### Andaneyð

Á koronudeildini liggja sjúklingar, sum eru hart raktir av koronu. Tey flestu liggja við andingartóli, sum hjálpir lungunum at fáa ilt út í kroppin. Sjúklingarnir liggja avbyrgdir inni á stovunum. Bert tá støðan er heilt álvarslig, kunnu avvarðandi koma at vitja. Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup Hansen gjørdu sendingina.

### Gimmi

Fyri 6 árum síðani brunnu húsini hjá Gimma Hansen í Rituvík niður í grund. Við eitt fór lívsverkið, hann sjálvur hevði smíðað sær, upp í royk. Men einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt. 93 ára gamli maðurin av Slættanesi er nú fluttur inn í kjallaran hjá soninum í Signabø, har hann tekur bussin hvønn fyrrapart til Havnar. Í býarlívinum hevur Gimmi Hansen fingið nýtt lív og nýggjar vinir. Vit fylgdu honum ein summardag í juni í fjør. Finnur Koba hevur klipt og lagt til rættis. Jónfinn Stenberg hevur filmað og klipt.

### Altjóða kvinnudagur úr Fuglafirði

Í 2022 sendi Kringvarpið fyri fyrstu ferð beinleiðis frá Altjóða Kvinnudegnum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tiltakið 'Konubrot og Britubrim' viðger manglandi javnstøðuna og møguleikarnar fyri einum betri samfelagi í framtíðini. Sofaprát, skemt og spísk upplegg, kryddað við list og tónum.

### Páskakonsert við Fljóðljóð

Páskadag vísti Kringvarpið eina páskakonsert í sjónvarpinum við kórinum Fljóðljóð. Fljóðljóð er kvinnukór við 16 royndum sangarum, stovnað á heysti 2016. Kórið syngur ymisk sløg av tónleiki, bæði klassiskt, sálmasang og aðrar norðurlendskar kórsatsir, umframt nýggjari, lættari tónleik. Kórleiðari er Súsanna Joensen, Mathias Dimon Næs framleiddi.

## Størri framleiðslur

### Hvør veit

Á vári í 2022 vóru 12 sendingar av undirhaldsrøðini 'Hvør veit?' tiknar upp í Studio 1, Kringvarpshøllini. 'Hvør veit?' er spurnakapping í sjónvarpinum, har tvey lið kappast um, hvør veit best. Liðini eru mannað við skiftandi fólki, sum svara spurningum um land okkara. Lagt til rættis og dómari: Kári Sólstein. Vertur: Tróndur Vatnhamar.

### Sært tú meg?

'Sært tú meg?' er nýggj røð í fýra pørtum. Fýra ung fólk, sum ikki kennast frammanundan, koma saman í eitt rúm, har endamálið er at seta orð á kenslur. Í rúminum eru fýra stólar. Ein er reyður, og har situr frásøgufólkið ella tann, ið sigur sínar hugsanir. Hini kunnu spyrja um mestsum alt.

Maria Winther Olsen og Anna Joensen-Næs hava gjørt 'Sært tú meg?', har fyrsta umfar var sent í ár, meðan upptøkurnar til annað umfar eru gjørdar.

**Innsavningarsendingar**

Í 2022 vóru tvær stórar innsavningar. Í mars var ein stór innsavning til frama fyri Ukraina, sum var send úr Lívdini í Hoyvík. Talan var um stuðulskonsert við framførslum frá Eyðuni Nolsøe, Lív & Tróndi, Lenu Andersen, Signari í Homrum, Kára P., Guðrið Hansdóttir, Sámali Ravnsfjall, Karl Martin og Rúnu á Heygum, Fríða Sigmundsson, Róki Jákupsson, Georg eystan Á, Mariusi og Ester Kristiansen. Uni Holm Johannesen og Barbara Holm vóru vertir, Raclip framleiddi.

Tað var eisini Raclip, sum framleiddi innsavningina fyri Bláa Kross í oktober. Sára Jógvansdóttir og Jákup Dahl vóru vertir í tí sendingini.

Aftur at hesum var eisini árliga innsavningar-konsertin fyri Barnabata.

**Seks spurningar um at vera menniskja**

Sjónvarpsrøðin hjá Dánjali á Neystabø og Búa Dam var send á vári 2022. Talan er um barnasjónvarp, ið setir sjóneykuna á teir stóru og torgreiddu spurningarnar í tilveruni á ein stuttligan og barnsligan hátt. Seks partar eru tilsamans, hvør partur er 20 minuttir til longdar, og fyrsti partur var sendur 11. mars.

**Í Luftini**

Í tveimum umførum vóru tónleikaupptøkur og prát til Í luftini gjørdar. Í luftini er eitt samstarv við FMX (Faroese Music Export) og verður sent í sjónvarpinum. Í Luftini var fyrstu ferð sent í 2020. Tá bleiv alt, tónleikur og samrøður, tikið upp í kringvarpshøllini. Í seinasta umfarinum av røðini var farið út úr studionum at gera samrøðurnar, meðan tónleikurin enn sum áður var tikin upp í kringvarpshøllini.

Elin Dagbjartsdóttir Neshamar var framleiðari og Rólant Waag Dam vertur.

**Ítróttafagnaður**

Á stórslignum tiltaki fagnaði Ítróttasamband Føroya ítrótti og ítróttafólki. Seks heiðurslønir vóru handaðar. Tær vóru: Ítróttanavnið, Stjørnuskotið, Fyrimyndin, Felagsskapurin og Átakið, og størsti heiðurin, sum er heiðursskjal Poul E. Petersen, var eisini latin.

Tiltakið var á Hotel Hilton í Havn, Uni Holm Johannesen og Solby Christiansdóttir vóru vertir, Símun Christian Olsen redaktørur og Rúni Friis Kjær framleiðari.

**Beinleiðis sjónvarp á ólavsøku**

Eins og vanligt er, sendu vit beinleiðis sjónvarp ólavsøkuaftan. Vit høvdu studio í Vágsbotni og fólk við sendarum kring býin. Eins og í 2021 var sendingin gjørd á sjálvum degnum, eisini bandaðu innsløgini – hetta fyri at fáa so nógvan ólavsøkuhýr við í sendingina sum gjørligt.

Vit fingu gestir í studio, høvdu ólavsøkuheilsanir, hoyrdu kórsang, vóru til Pride-skrúðgongu, vitjaðu og ummældu listaframsýning og so framvegis.

Marin Hermansdóttir Eidesgaard var vertur, Krista Kreutzmann, David Thomassen og Rannvør Fríða Eyðunsdóttir reportarar, Rólant Waag Dam redaktørur og Herluf Sørensen framleiðari.

**Sement-finalan beinleiðis í sjónvarpinum**

Sum nakað nýtt sendu vit finaluna av tónleika-kappingini Sement í sjónvarpinum. Biit-toymið hevði frammanundan framleitt og stroymt øll undan-umførini av kappingini á kvf.fo. Hetta við vertum, viðmerkjarum, reportarum og samrøðum við allar bólkarnar og gestir. Framleiðslan mentist fyri hvørt umfar, og tí var avgjørt at senda finaluna í sjónvarp-inum. Talan var um góðar fýra tímar av beinleiðis sending. Fríði Birgisson Olsen framleiddi, og David Thomassen og Rannvør Fríða Eyðunsdóttir vóru vertir. Redaktørur var Rólant Waag Dam.

**Beinleiðis sjónvarp á nýggjárinum**

Aftur í ár sendi Kringvarpið beinleiðis nýggjárs-sending í sjónvarpinum nýggjársaftan við gestum í Sortudíki, innsløgum kring alt landið, løgmansrøðu, viðgerð av løgmansrøðuni og nýggjársheilsanum.

Sendingin var send beinleiðis úr forhøllini í Kring-varpi Føroya, har Anna Poulsen og Kári Sólstein vóru vertir, Sára Jógvansdóttir redaktørur og Mathias Dimon Næs framleiðari.

**Beinleiðis sjónvarp frá Mentanarvirðislønum landsins**

Mikukvøldið 19. januar vóru árligu virðislønirnar til lista- og mentafólk 2022 handaðar. Vit sendu beinleiðis úr Salt, har Heiðursgáva og Serstaka virðisløn landsins eisini vóru handaðar. Jenis av Rana, landsstýrismaður við mentamálum, handaði virðislønirnar. Vertur var Páll Danielsen.





# Útvarp

Útvarpsskráin er bygd upp við flatum, har sent verður dagliga við sendingum og røðum. Gerandisdagarnir hava rútmu, har dagarnir líkjast, meðan vikuskiftini líkjast burturfrá. Tað er ov umfatandi og rúgvusmikið at lýsa hvørja sending, men næstu reglurnar vísa nakað av tí, sum er framleitt av mentanartilfari á útvarpssíðuni farna árið.

### Góðan morgun Føroyar

Hvønn gerandismorgun er Góðan morgun Føroyar er á skránni frá klokkan 7.35 til 9.50.

Evnisliga hevur sendingin stóra breidd og málbólkurin er framvegis breiður. Alt frá fuglatátti, serfrøðingum, veðurforsøgnum, kappingum og søgum kring landið. Eisini hevur sendingin í størri mun sent video beinleiðis á netinum, og hevur hetta verið sera væl umtókt við nógvum hyggjarum.

Fleiri nýggir tættir eru í sendingini veturin 2022. Nevnast kann m.a. Friggjadagspanelið, har trý fólk hvønn fríggjamorgun kjakast um søgur úr vikuni.

### Ljóarin

Ljóarin er mentanarsending, sum er seinnapartar í útvarpinum. Ljóarin leggur seg eftir at viðgera mentan í breiðum týdningi, og lyklaorð fyri sendingina eru refleksión og umhugsni.

Málið er at geva lurtaranum upplýsing, uppliving og undirhald gjøgnum beinleiðis útvarp, kryddað við reportastjum, frásagnum og kjaki, har stundir eru til longri samrøður, viðgerðir og greiningar.

## Røðir og stakar sendingar

Umframt størru flaturnar eru ein rúgva av røðum og støkum sendingum á skránni. Tær føstu og væl kendu sendingarnar eru m.a. Við Tórði á túri, Brunsj, Vikuskiftið, Meg Minnist, Credo, Gentuvesið og Málteigurin. Í fyrru hálvu var Kvørnin á skránni hvønn mikudag við tónleikaummælum. Harafturat hava fleiri styttri og longri røðir verið á skránni í 2022.

### Fríðhild

Sendingin Fríðhild, í tveimum pørtum, er um Fríðhild Abrahamsen í Fuglafirði, sum var fødd fyri 81 árum síðani í Akrabergi. Mamman var 18 ára gomul og fekk tvíburar, tvær gentur – Fríðhild var onnur – og har var eingin pápi. Tey allarfyrstu árini av lívinum búði Fríðhild í Sumba – men síðani fór hon saman við systrini til Hvalbiar at vaksa upp hjá mammuni og fosturpápanum. Í ungdómsárunum var hon í sjey ár aftur í Sumba og hjálpti ommuni og abbanum, til hon giftist og fekk familju í Fuglafirði. Har hevur hon trivist væl. Tórður Mikkelsen legði sendingina til rættis.

### “Eg havi verið niðri við havsins botn og stundum uppi við ský”

Eyðun Andreassen, professari í fólkalívsfrøði, sigur frá sínum barnaárum úti í Skúvoy. Foreldrini vóru lærarar, og teir eru fýra beiggjar. Hann fekk alsk til kvæði og bókmentir og fór at lesa fólkalívsfrøði. Hann hevur starvast á Fróðskaparsetri Føroya, har hann hevur undirvíst, granskað og skrivað bøkur og hevur eisini fingið M.A. Jacobsens virðisløn fyri yrkisbókmentir. Hann hevði nógv arbeiði eftir at fáa frá hondum, tá ein blóðtøppur setti hann í ein rullistól, og seinastu fýra árini hevur hann búð á Lágargarði. Armgarð Arge gjørdi sendingina.

### Óbodna gentan á hotellinum

Útvarpsdokumentarur um eina merkisverda hending, sum fór fram á Hotell Føroyum í 2009, tá ein útlendsk genta kemur undan kavi. Á vári í 2009 varnast gongsgenturnar á Hotell Føroyum, at alt ikki ruggar rætt á hotellinum. Ein fyri og onnur eftir boðar frá, at tær hava sæð ein óbodnan gest reikað í gongini og í kømrunum. Tað endar við, at starvsfólkini á hotellinum gera eina roynd at reka óbodna gestin undan kavi. Finnur Koba hevur lagt sendingina til rættis.



**Nert ikki við**

Nert ikki við er røð í útvarpinum, sum nertur við evnir, ið vit vanliga ikki tosa um innan sálarheilsuøkið í Føroyum. Evnini hava m.a. verið eldri og sálarheilsa, happing og forelskilsi og hjartasorg. Sendingarnar verða gjørdar av Biit, og tað eru Anna Joensen-Næs og Bjørt Lind, sum leggja til rættis.

**Gaini & – ein sending um gransking**

Sigri M. Gaïni tosar við ymiskar granskarar um, hvørjum teir granska í, og hvørjar tankar teir gera sær um yvirskipaðu uppgávuna, sum gransking hevur í samfelagnum. Gestirnir hava m.a. verið Marnar Fríðheim Kristiansen, Maria Skaalum Petersen og Ivonna A.S. Johansen.

**PolEtikk**

Annað umfar av røðini PolEtikk var sent tíðliga í heyst. Í trimum umførum viðgjørdi pallborðið evnið kynsdiskriminatión og javnstøðu millum kynini. Pallborðsfólkið var Bjørt Lind, Lív Patursson, Arni Zachariassen, Brandur Mortensen Nolsøe, Ingilín Didriksen Strøm og Stefan Klein Poulsen.

**Hiit**

Hiit var summarsendingin hjá ungdómstoyminum Biit. Talan var um gott lag og undirhaldandi útvarp, har toymið syrgdi fyri, at fólk kom í summarhýr. Sendingin var hvønn seinnpart týsdag til fríggjadag, umframt at toymið eisini sendi frá Voxbotni, G!- og Summarfestivalinum.

**Vetrarbiit**

Vetrarbiit er ein øðrvísi aktualitetssending, sum Biit ger. Sendingin er á skrá hvønn fríggjadag, har tey taka upp eitt evni og viðgera tað út frá ymiskum vinklum og við ymiskum gestum. Eitt nú hava tey umrøtt sex, alkolismu, kríggið í Ukraina og diagnosur.




# Gekkurin 25 ár

25. februar 2022 fylti Gekkurin 25 ár. Tá hevði gekkahjólið snarað 1.260 ferðir, síðan Gekkurin fyrstu ferð sá dagsins ljós í sjónvarpinum tann 21. februar 1997.

Undirtøkan fyri Gekkinum var ómetaliga stór longu frá fyrsta degi. Fyrstu mongu mánaðirnar táttaði sølan í 25.000 seðlar um vikuna.

Fyrstu tvey árini var vinnarin frá seinasta fríggjakvøldinum inni í sjónvarpsstovuni og snaraði hjólinum. Seinni gjørdist møguligt at ringja inn í sjónvarpsstovuna og snara hjólinum við at trýsta á knøttarnar á telefonini.

Gekkurin hevði koyrt meira ella minni á sama hátt síðan tá. Men í sambandi við 25 ára dagin í 2022 var skipað fyri rimmar føðingardagsgekki og fleiri dagføringum av eydnuspælinum.

**Gekkurin í nýggjum hami**

Á sjálvum 25 ára degnum vóru nýggir vinningar í miðdeplinum. Ein Volvo-bilur krógvaði seg í øðrum leypinum og ein marglætisferð til Bahamas við 50.000 krónum í lummapeningi í hinum leypinum. Stóra gekkaupphæddin var í triðja leypinum.

Ein varandi dagføring var, at upphæddirnar á hjólinum hækkaðu, so tað nú ber til at vinna millum 20.000 og 50.000 krónur á hjólinum.

Raðspælið er nú eisini meira spennandi, tí ein krússapottur við virði upp á 50.000 krónur fjalir seg aftan fyri eina av lúkunum.

# Visti tú?

## Vertirnir

Fleiri av teimum, sum hava verið vertir í Gekkinum seinastu 25 árini, eru vorðin ímyndin av bingospælinum. Tey, ið eru vertir í dag, hava verið við síðan 2006.

Sjey gekkavertir hava verið í hesi 25 árini, tó hevur onkur avloysari verið á einstøkum sendingum.

## Gekkalagið

“Ramdidi ramdam ram dam dei”. Flest øll munnu hava sungið ella murrað gekkasangin onkuntíð. Tað er Finnur Hansen saman við Kaj Johannesen, sála, ið hevur gjørt eyðkennislagið til Gekkin. Íblásturin til lagið er sprottin úr einari gamlari føroyskari vísu og einum niðurlendskum sangi.

## Vinningar

Á leið 120 milliónir krónur eru vunnar í Gekkinum samanlagt, umframt ein ørgrynna av lúkuvinningum. Millum ár og dag hava telefonir við antennu, veðrakrov, eldsløkkjarar og enntá ein snella verið millum vinningarnar.

Størsta upphædd, ið er vunnin í Gekkinum, er 3,4 milliónir krónur.

# Átrúnaður



# Trúarlívið

**Hetta heilaga evangeliið skrivar**

Sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl. 17.45 og endursend sunnumorgun kl. 8.45. Tað eru ymiskir prestar, sum skriva til eitt kirkjuár í senn. Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent.

Í ár hevur Símun Persson Jacobsen, prestur, skrivað nakrar mánaðir. Theodor E. D. Olsen, prestur, skrivar nú hetta kirkjuárið.

**Morgunlestur**

Ymiskir prestar hava skrivað morgunlestur, og teir og leikfólk lesa.

**Sálmasavnið**

Enn eru nógvir sálmar, sum skulu syngjast inn til savnið og syngjast umaftur, tí ljóðgóðskan er ov vánalig, men tað tekur tíð.

**Møti í útvarpinum**

Seks ferðir um árið senda vit evangeliskt møti hjá Brøðrasamkomuni. Vanliga verða tey send sunnudag kl. 17.00. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

**Ferðaliðið**

Hetta er toymið, sum tekur møti og gudstænastur upp hvønn sunnudag og verða send í sjónvarpinum. Síðani koronudagarnar hava vit hvønn sunnumorgun tekstað alla gudstænastuna og ofta eisini prædikuna hjá presti. Vit teksta sang/sálmar hjá fríkirkjunum.

**Gudstænastur í útvarpinum**

Vit royna at senda gudstænastur kring alt landið, har tað ber til. Í útvarpinum og sjónvarpinum senda vit somu gudstænastu beinleiðis.

Allahalgannaaftan senda vit gudstænastu úr Dómkirkjuni beinleiðis í útvarpinum

**Nýggjársgudstænastan**

Gudstænastan nýggjársaftan og nýggjársdag var í Hoyvíkar kirkju, har Bergtórur Hjelm Bjarkhamar, prestur, prædikaði. Tórshavnar Manskór sang, og Sway sang tveir sangir.

**Gudstænastur og møti**

Møtini og gudstænastur eru úr Katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuliga Heimamissiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum og Heimamissiónini.

**Andaktir í sjónvarpinum**

Andakt er hvørt sunnukvøld kl. 19.50. Tað eru ymsar samkomur og kirkjur, sum skriva og lesa hesar andaktir.

Á mishalgidøgum/hátíðum eru tað prestar í Fólkakirkjuni, sum skriva og lesa. Hesar andaktir verða tiknar upp í ymsum kirkjum. Í adventini í ár royndu vit annan “andaktsleist”, har vit tveir sunnudagar vóru við Sverra Steinhólm, presti, og prátaðu úti í Sandagerði og á hospitalinum og fongslinum, tí hann er fongsuls- og hospitalsprestur.

Hinar báðar adventssunnudagarnar vóru vit í biskupsgarði og í Havnar kirkju við Jógvani Fríðrikssyni, biskupi.

**Credo**

Credo er hvønn sunnudag kl. 10.05, har ljós verður varpað á átrúnað og onnur menniskjanslig viðurskifti og rák. Sannast má, at persónliga søgan hjá einstaka føroyinginum hevur stóran lurtaraskara.

# Ungdómur



# Gentuvesið vísir vegin




**Biit fekk virðisløn og fór í sjónvarpið**

Um 2021 var árið, tá ungdómstoymið Biit fekk fótin fyri seg og lærdi at ganga, so fór Biit av sonnum til stroks í 2022.

Biit-framleiðslur eru í dag fastur partur av útvarps-skránni. Summarsendingin 'Hiit' koyrdi hvønn dag í summar við einum toymi við fimm-seks fólkum, sum gjørdu lætt, livandi og frískligt summartilfar. Eisini sendu hesi beinleiðis frá Voxbotni, G!-festivalinum og Summarfestivalinum. 'Hiit' var so mikið væl umtókt, at toymið var biðið um at gera eina vikuliga vetrarsending, 'Vetrarbiit', sum hvønn fríggjadag leggur seg eftir at hava eina øðrvísi aktualitetssending til ung.

Henda sendingin kemur aftur at hinum Biit-framleiðslunum, sum eisini eru ella hava verið í útvarpsskránni.

Sendingin 'Boyggjar', sum brøðurnir Svend og Heri Danielsen gjørdu, var send tíggju ferðir. Annað umfar av røðini 'PolEtikk' hjá Davidi Thomassen fór í luftina í september – ein kjaksending í trimum pørtum um javnstøðu.

'Nert ikki við' hjá Annu Joensen-Næs og Bjørt Lind var eisini send fyri fyrstu ferð. Talan var um stuttrøð í fýra pørtum, sum varpaði ljós á sálarheilsu. Hesar eru nú í gongd við at gera annað umfar í røðini, sum skal sendast í 2023.

Biit gjørdi, eins og í 2021, eisini eina serliga nýggjárs-sending. Talan var um tveir tímar, har tey hugdu aftur á árið við útgangsstøði í teimum sendingum, tey annars hava gjørt. Sostatt varpaðu tey ljós á tað politiska, mentanarliga og sálarheilsuliga í hesi sending.

**Gentuvesið vann virðisløn**

2022 var eisini árið, tá Gentuvesið fekk Ársins miðla-heiðursløn frá LGBT+ Føroyar:

"Tit seta lit á Kringvarpið. Tað lýsir av tykkum og hoyrist so væl, at tit brenna fyri tí, tit gera. Tit gera stóran mun, tí loyvt er at spyrja um alt, og loyvt er at tosa um alt. Júst tað er so týdningarmikið."

Soleiðis ljóðaði millum annað í grundgevingunum hjá LGBT+ Føroyar fyri at lata Gentuvesinum virðislønina.

Eisini segði LGBT+ Føroyar, at gestirnir, sum Rannvør Fríða Eyðunsdóttir og Annika Dalsgaard velja til sínar sendingar, kenna seg bæði hoyrd og sædd í sendingunum, sum bæði rúma opinleika, fjølbroytni og ymisleika.

Gentuvesið hevur verið á skrá hvønn mikudag í vetur, umframt at tær báðar eisini hava havt Gentuvesið til ymisk tiltøk, eitt nú á G!-festivalinum.

**Fleiri sjónvarpssendingar**

Biit legði eisini eftir seg fleiri sjónvarpssendingar í 2022. Tað byrjaði við, at Biit stroymdi trý umfør av tónleikakappingini Sement á kvf.fo. Tá finalan kom, var avgerð tikin um, at henda skuldi vísast beinleiðis í sjónvarpinum, tí góðskan á framleiðsluni bar tað.

Tí sendi Bit sína fyrstu sjónvarpssending við Sement-finaluni. Beinleiðis sjónvarp við tónleiki, vertum, reportara og viðmerkjarapráti. Alt toymið vóru ung fólk, sum eru knýtt at Biit – alt frá vertum til fotografar og framleiðara.

Biit var eisini við, tá Geytin skuldi latast, tí hesi stóðu fyri steðginum á kvøldinum, har tey við pallborði, bandaðum innsløgum og práti við gestir syrgdu fyri, at fólkið heima í stovunum kring landið høvdu okkurt at stytta sær stundir við, meðan atkvøðugreiðslan var gjørd upp.

Biit gjørdi eisini ein heimildarfilm, sum var vístur í sjónvarpinum. Fríði Djurhuus og Petur Sigurð í Króki gjørdu í felag filmin "Hatta niðurlagið kemur ikki", sum gav okkum eitt innlit í, hvat noise-tónleikur er fyri nakað. Tríggir heimildarfilmar um tónleik eru annars í gerð, og verða hesir væntandi klárir at senda í 2023.

Í dag eru umleið 15 fólk knýtt at Biit-toyminum. Nøkur nýggj fólk eru komin afturat í 2022, og ætlandi skulu fleiri setast í 2023. Rólant Waag Dam er verk-ætlanarleiðari og redaktørur hjá Biit.

# Børn


October 12
MIC
LIVE
PRMT
PROG
10:45:33
LP-1
LP-2
LP-4
CAM1
CAM2
CAM3
CAM4
AUX1/M1PG
M1PV
EXT1
EXT2
EXT3
EXT4
Prompter
VizPlayA
VizPlayB

# Tey smáu oyruni og eyguni



### Fiktión í barnaútvarpinum

Tað er sera týdningarmikið, at føroysk børn hoyra fjølbroytta fiktión, soleiðis at tey sleppa at liva seg inn í eina góða søgu, borðreidda við ljóði og tónleiki. Vit løgdu fyri við at hoyra útvarpsleikin 'Søgan um Sigmund', sum er útvarpsleikur í tólv pørtum. Síðani hoyrdu vit ræðuligu søguna um 'Lítlu hon', sum er ljóðmynd í átta pørtum.

Skemtingarsama fiktiónin fekk eisini rúmligt pláss í sendiskránni hjá barnaútvarpinum. Á vári og á heysti vóru vit í Mórugøtu 8 og vóru í skúla saman við Kenneth, Katju, Jón og vikarinum.

Bøkurnar hjá Kim Fupz Aakeson eru sera væl umtóktar, og vit hoyrdu bøkurnar um Vitello, bókina um Hannibal og horvna hundin, sum er ljóðmynd í níggju pørtum, og bókina Sunnudagur, sum er ljóðmynd í trimum pørtum.

Klassisku søgurnar vóru eisini væl umboðaðar. Vit hoyrdu søgur um Pippi og onnur, sum Astrid Lindgren skrivaði. Og vit hoyrdu ljóðmyndina um Gummi Tarzan, sum Ole Lund Kirkegaard skrivaði. Í tveimum umførum vóru føroyskar upprunasøgur lisnar – stuttsøgur, sum føroyskir rithøvundar hava skrivað. Vit leggja okkum eftir at senda nýútkomið tilfar og sendu bókina 'Nógv tann elsti í flokkinum'.

Jólakalendarin í barnaútvarpinum var bókin Snjósystirin, sum var útvarpsleikur í 24 pørtum. Søgan snýr seg um Jóal, sum hevur føðingardag sjálvan jólaaftan, og sum plagar at vera besti dagur í árinum. Men í ár er einki, sum tað plagar at vera, tí Jóal og familjan syrgja stórusystrina, Juni, sum er deyð. Jóal heldur, at jólini rætt og slætt eru avlýst. Men ein dagin hittir hann ta lívsglaðu Hildigunn. Hon minnir hann á, hvussu góð jólini kunnu vera. Ein søga at taka fram aftur og aftur, har til ber at fegnast um at vera á lívi og at ynskja sær og hvørjum øðrum eini góð og gleðilig jól.

### Evnisvikur

Vit valdu at varpa ljós á rusk og dálking og gjørdu evnisviku, sum bar heitið 'Ruddið Føroyar'. Í tveimum umførum var barnapanelið á skrá. Børn tosa um heimspeki, og seinna vikan var send í sambandi við, at løgtingsvalið var útskrivað. Bøkur var eisini evni í barnaútvarpinum – sendingar við føroyskum rithøvundum og nýútkomnum bókum.

### Lova mær við

Í 'Lova mær við' siga børn sínar søgur og bjóða okkum við til eitthvørt. Vit ferðast kring landið og hoyra um djór, tónleik og onnur áhugamál. Vit hoyrdu um planetir í Klaksvík, kvæði á Argjum, víkingar á Velbastað, djór í Rituvík, hundalív á Skála, tekniskeið við Løkin og mangt, mangt annað.

### Viðkomandi sendingar

Vit fylgja árstíðini og gera ymiskt burtur úr barnatiltøkum. Eitt nú innsavning til Ukraina, um konsertir, sjónleikir, skúlaleikir, endurskin, bøkur, um náttúru, og vit hoyra børn syngja.

### Føroyskar sendingar í barnasjónvarpinum

Nógv var gjørt burtur úr føroyskum barnasendingum, sum vóru á skrá fríggjakvøld klokkan 18.30. Vinus og Vimús var til tey minstu børnini. Síðani kom røðin 'Seks spurningar um at vera menniskja'. Sendirøðin er bygd á hugskot hjá Búa Dam og Dánjali á Neystabø. Búi Dam hevur skrivað handrit og leikstjórnað. Teir hava framleitt sendirøðina í samstarvi við Kringvarpið. 'Seks spurningar um at vera menniskja' er føroysk framleidd barnasendirøð í seks pørtum.

Sendirøðin snýr seg um teir báðar serskøltarnar Dánjal Kagadingding og Búa Sibbidibbidimdim. Teir búgva í húsunum hjá Tebryggjaranum. Úr



samdreymum spyrjast stórir spurningar, so sum: Hvør eri eg? Ber til at liva í alla tíð? Ber tað til at fanga ljósið? Hesir stóru spurningar ørkymla Dánjal og Búa, og royna teir, alt teir kunnu, at svara teimum. Hetta elvir tó ofta bara til enn meira ørkymlan. Men í húsunum hjá Tebryggjaranum fáa teir ta hjálp, teimum tørvar. Tebryggjarin bryggjar teimum eitt serligt tebland (Spælibryggj), sum hjálpir teimum at síggja trupulleikarnar í einum øðrum, meira spælandi, ljósi.

Fýra stakar sendingar vóru framleiddar, ætlaðar teim eldru børnunum, við heitunum ‘Dreymurin um eitt hondbóltslív’, ‘Guli skúli’, ‘Rudda botnin’ og ‘Aftur mett í dag’. Síðani var Suma á skrá – fimm sendingar, sum hyggja nærri at fimm ymiskum børnum og teirra gerandisdegi.

Sendirøðin við Angelu og Hannibal vendi sær til smærri børnini. Í seks pørtum vóru vit við Angelu og Hannibal og fleiri øðrum á Sjósavninum og aðrastaðni og fingu nógvar stuttligar og litríkar upplivingar.

Sakin var aftur sera væl umtókt, tá ið hon var send í barnasjónvarpinum friggjakvøld. Innsløgini vóru ymisk, og børn kring landið sluppu til orðanna at vísa síni kynstur ella greiða frá hugtakandi søgum. Við degnum í dag fingu vit nýggja vitan borðreidda við góðum grafikki. Petursa borð var skemtiligt, og fleiri gátur vóru loystar.

Látiløtan kom væl við hjá teimum smáu børnunum, sum borðreiddi við føroyskum rørslusangum.

Tjóvajólini var jólakalendarin í barnasjónvarpinum, og sendingin ‘Meðan vit bíða’ var send jólaaftan við fjølbroyttum innsløgum, tónleiki, kóri og mongum øðrum.

**Teknirøðir**

Grísa Peppa er ein fittur, lítil grísur. Hon er fýra ára gomul. Heima hjá teimum búgva Grísamamma, Grísapápi, Peppa og lítlibeiggin, George. Nú tosa tey føroyskt, og væl umtókta teknirøðin var frá ársbyrjan sera væl móttikin av føroyskum børnum og foreldrum.

Fleiri nýggir partar av Mouk vóru framleiddir til sendingina Snipp Snapp. Mouk og Chavapa ferðast ymsastaðni í verðini og eru hugtiknir av mentanini og øllum tí, sum eyðkennir hvørt einasta stað.

‘Smábørn’ er røð við føroyskari talu til tey smæstu. Í átta pørtum sóu vit fílin og smábørnini forvitnast.

# Tónleikur



# Føroyskur tónleikur er fremstur í Kringvarpinum



Tað hevur alstóran týdning fyri føroyskan tónleik, at hann verður hoyrdur um alt landið, og tí fær føroyskur tónleikur stórt rúm í útvarpinum. Fimta árið á rað var meira enn helvtin av tónleikinum í útvarpinum av føroyskum uppruna í 2022.

Tónleikaredaktiónin í útvarpinum hevði vikuligar fundir, har nýggjur tónleikur var spældur og viðgjørdur, áðrenn hann var settur í umferð. Uppskotini komu frá tónleikarum, plátufeløgum, lurtarum hjá útvarpinum og starvsfólkum í Kringvarpinum. Í alt vóru 158 nýggir føroyskir sangir við 96 ymiskum tónleikanøvnum settir í umferð í útvarpinum í 2022.

**Spæl føroyskt-vika**

Spæl føroyskt-vika var frá 1. til og við 7. mars, og tá var einans føroyskur tónleikur spældur í øllum frumsendingum, á náttarrásini og rundan um sendingar annars í útvarpinum.

**Ársins útvarpshitt**

Ársins útvarpshitt var kosið í 2022 á triðja sinni. Talan var um eina atkvøðugreiðslu, ið gekk fyri seg á heimasíðuni, kvf.fo, í Spæl føroyskt-vikuni.

Lurtararnir hjá Kringvarpinum valdu sangin "Tað kundi verið tú", sum børn á Skúlatrøð syngja, til at vera Ársins útvarpshitt í farna árinum 2021.

**Faroese Music Awards 2022**

Føroysk tónlist var fagnað og heiðrað, tá FMA var fyriskipað í Norðurlandahúsinum tann 12. mars.

Tiltakið var víst beinleiðis í sjónvarpinum.

Í alt vóru 17 virðislønir latnar fyri framúr avrik innan føroyskan tónleik, og fyri fyrstu ferð var Exportvirðislønin latin í samstarvi við FMX, tónleikaútflutningsstovuna.

**Nýggjárskonsertin 2022**

Kringvarpið sendi nýggjárskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum beinleiðis í sjónvarpinum fyri fyrstu ferð í trý ár.

Á konsertini við Føroya Symfoniorkestri og kóri luttóku Herfinnur Árnafjall, baritonsolistur, Hanne Marit Mordal Iversen, sopransolistur og Aksel Remmel, klaversolistur.

**Konsertupptøkur, ið vóru sendar í sjónvarpinum í 2022**

Ein rúgva av konsertupptøkum vóru sendar í sjónvarpinum í 2022, m.a. nýggjárskonsertin við Føroya Symfoniorkestri, jólakonsertir, frá Sement 2022, TeenStreet-konsert, Faroese Music Awards (FMA) og 5 ymiskar 'Í luftini'-konsertir.

Sjónvarpið sendi harumframt javnan nýggj og eldri videoløg sum millumsendingar.

**Vikuligu tónleikasendingarnar í útvarpinum í 2022**

Vikuligu tónleikasendingarnar í útvarpinum eru smalar, men okkurt er fyri øll – poppur, klassiskur tónleikur, jazz, andaligur tónleikur, tónleikaummæli, nýggjur og gamal tónleikur, kvæði, rokkur, dansibandstónleikur o.m.a.

Harumframt vóru eisini aðrar stakar tónleikasendingar í sambandi við høgtíðir og merkisdagar.

Tónleikasamskipari: Eyðfinn Jensen.

# SAVNS GULL

Aftur í ár hevur verið arbeitt fram móti at bjarga tilfari í kringvarpssavninum. Í kringvarpssavninum eru pappírstíðindi, ljóðbond og sjónvarpsbond, ið lýsa okkara søgu frá 1957, tá Útvarp Føroya fór at senda fyri fyrstu ferð, og í 1984, tá Sjónvarp Føroya var sett á stovn.

Av tí at tíðin máar sendingar úr hesum upprunatilfari, verður arbeitt fyri at bjarga okkara mentanararvi á tann hátt, at alt tilfarið verður talgildað.

Arbeiðið við pappírspartinum hevur umfatað talgilding og skráseting. Vit kunna gleðast um, at øll skjølini blivu talgildað í ár og harvið eru varðveitt fyri eftirtíðina. Skjalasavnið fevnir um oman fyri 500.000 skjøl. Av fíggjarligum ávum var ikki møguligt at hava eins nógv fólk at skráseta sum undanfarnu ár. Tí fekst ikki eins nógv burturúr, sum væntað var í 2022.

Tað miðvísa arbeiðið at talgilda ljóðbondini hevur gingið væl, og av tí at tað eru fleiri bond í savninum enn væntað, var ikki komið á mál í endanum av 2022. Tað var væntað at vera um 27.000 bond, men savnið fevnir um fleiri, og tí verður hildið áfram at talgilda, til alt savnið er bjargað. Væntandi er alt ljóðbandasavnið talgildað komandi árið.

Tað komu nøkur fá hundrað sjónvarpsbond undan kavi, og hesi blivu eisini talgildað, soleiðis at alt sjónvarpssavnið nú er bjargað.

Vit liva í einari tíð, har møguleiki er fyri at brúka tilfar úr savninum, tá vit hava hug. Vit kunnu t.d. hoyra brot, ið minna okkum á okkurt serstakt; vit kunnu hoyra frásagnir um ítøkilig støð ella hendingar. Kringvarpssavnið goymir nærum allar hendingar, sum hava týdning fyri okkum sum føroyingar, og har eru uttan iva eisini brot í savninum, sum hava persónligan týdning fyri summi.

Arbeitt hevur eisini verið við at fáa tann seinasta partin av verkætlanini í gongd – at gera savnið atkomuligt fyri almenninginum.



# Public Service

# Føroyskt mál í Kringvarpi Føroya

Kringvarpið er tilvitað um ábyrgdina og týdningin, ið stovnurin hevur fyri føroyska málið. Strembanin er, at allar sendingar, ið verða framleiddar, eru á góðum, føroyskum máli. Fyri at lúka hesar treytir var málpolitikkur fyri stovnin orðaður og settur í verk í 2022, og samstundis vóru málslig umboð sett á øllum deildum, sum starvsfólk kunnu venda sær til við ivamálum um føroyska málið.

Eisini kann nevnast, at málsligar vendingar verða umrøddar vikuliga á innanneti Kringvarpsins.

Umframt hetta er málsendingin “Málteigurin” á skránni hvørja viku, har málserfrøðingur greiðir frá, og lurtararnir hava høvi at seta spurningar.

**Málpolitikkur fyri Kringvarp Føroya**

Kringvarp Føroya er útvarp, sjónvarp og netvarp til allar føroyingar. Sum einasti miðil av sínum slagi framleiðir Kringvarpið tilfar á føroyskum, og tí er málið eitt av størstu ábyrgdarøkjunum hjá stovninum, og eigur stovnurin at ganga á odda, bæði tá ið tað kemur til at varðveita og at endurnýggja málið. Og so hevur Kringvarpið eisini eina lógarbundna skyldu til at hava gott mál og at fjálga um tað.

Í mai 2022 var málpolitikkur fyri Kringvarpið samtyktur, soleiðis at stovnurin lýkur síni lógarásettu, málsligu krøv.

Endamálið við málpolitikkinum er at tryggja dygdargott mál á øllum miðlapallum, at javnseta málið við onnur fak í Kringvarpinum og at økja um málsliga tilvitið hjá starvsfólkunum.

Á heysti 2021 var ein arbeiðsbólkur settur at snikka saman málpolitikkin. Í arbeiðsbólkinum vóru Óluva Klettskarð, umboð fyri Føroyamál, Sólva Jónsdóttir, umboð fyri Nám, Ragnar Sigrunarson, umboð fyri Málstovuna, Jón Brian Hvidtfeldt, umboð fyri Felagið Føroysk Miðlafólk og Solby Christiansdóttir, umboð fyri Kringvarpið. Bólkurin kann tí sigast at vera breitt umboðaður.

Arbeiðsbólkurin hittist umleið eina ferð um mánaðin og skrivaði politikkin í felag. Síðani var politikkurin sendur starvsfólkunum í Kringvarpinum til hoyringar og at enda lagdur fyri kringvarpsstýrið.

Málpolitikkurin er skipaður við yvirskipaðum reglum fyri tilfar á øllum miðlapallum hjá Kringvarpinum, reglum um tekst, teksting og týðing, og síðani eru leiðreglur og tilmæli.

Málpolitikkurin er at finna á kvf.fo.

# Public service-skyldur

**Samskifti við borgaran**

Kringvarpið leggur seg eftir at skipa fyri upplýsing um public service og fólkaræði í breiðum týdningi. Vit virka í fólksins tænastu, og tí tryggja vit støðugt samskifti við borgaran um alt landið.

Orðaskifti er við jøvnum millumbilum um public service, innihald, endamál og miðlapolitikk. Talan kann vera um fund, ráðstevnu og almennar frágreiðingar um einstøku partarnar av public service-arbeiðinum. Í august í 2022 var stór miðlaráðstevna, 'Miðlar á vegamóti', hildin í Norðurlandahúsinum. Ráðstevnan setti sjóneykuna á føroyska miðlalandslagið og týdning tess í framtíðarinnar Føroyum. Frágreiðing um ráðstevnuna liggur á heimasíðuni.

Nýggj síða, Um KVF, er gjørd á heimasíðuni, har fesk tíðindi og blogginnlegg um stovnin, public service og programmvirksemi verða kunngjørd.

Góður møguleiki er fyri samskifti um alnet og heimasíðu stovnsins. Millum annað er møguligt at senda rís og rós á kvf.fo og at skriva til vangan hjá Kringvarpinum á Facebook, so tað ber til at siga sína hugsan um tíðindaflutning og programmvirksemi í Kringvarpinum.

**Alnetstænastur og sosialir miðlar**

Eitt av málunum hjá Kringvarpinum er at røkka føroyinginum, har hann er. Sosialir miðlar eru komnir fyri at verða, og føroyingar nýta nógva tíð á hesum miðlunum. Kringvarpið hevur í fleiri ár verið til staðar á sosialu miðlunum við tilfari, sum vísir til og skapar áhuga fyri sendingum á netinum, útvarpinum og sjónvarpinum. Kringvarpið virðir leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið á sosialu miðlunum á sama hátt sum á hinum miðlapallunum.

Heimasíðan hjá Kringvarpinum verður støðugt ment sum samskiftis- og tænastumiðil, soleiðis at hon kennist viðkomandi og týdningarmikil fyri føroyingar í øllum aldri. Heimasíðan fevnir um tíðindi og aktuelt, mentan, tilfar til børn og ung, undirvísing og annað viðkomandi.

Kringvarpið samskipar talgilt føroyskt tilfar til børn og ung, so at tað verður lætt atkomuligt. Á heysti í 2022 var farið undir at menna eina app til børnini. Appin verður væntandi útgivin á vári í 2023.

**Týtt, útlendskt tilfar**

Av tí at fíggjarlig orka ikki hevur verið til at týða alt útlendskt tilfar til føroyskt og orsakað av rættindaspurningum, hevur Kringvarpið lagt seg eftir at týða so nógv barnatilfar sum gjørligt. Tað er umráðandi, at føroysk børn hava atgongd til útlendskar teknifilmar, sum eru týddir til móðurmálið, eitt nú "Grísa Peppa" og "Enyo".

**Tænastur til fólk, ið bera brek**

Í 2022 var Dagur og vika deyvatulkað, og sendingin verður somuleiðis send við teksti seinni sama kvøld. Ymsar barnasendingar hava eisini verið deyvatulkaðar, so tunghoyrd foreldur kunnu hyggja saman við barninum. Dokumentarurin hóskvøld verður somuleiðis tekstaður.

**Keyptar framleiðslur**

Fríyrkisfólk hava staðið fyri meginpartinum av framleiðsluni av vanligu ítróttasendingunum. Til ítróttasendingina 3-2 hevur Kringvarpið brúkt fríyrkismyndafólk og fríyrkisprogrammfólk til hvørja sending. Kringvarpið hevur havt góðar royndir av hesi loysn.

Gudstænastur og møtir á sjónvarpsskránni hava verið framleidd av fríyrkisfólki gjøgnum drúgt áramál. Morgunlestrar og 'Hetta Heilaga Evangeliið Skrivar' í útvarpinum verða framleidd av fríyrkisfólki, eins og fríyrkisfólk standa fyri stórum parti av tónleikasendingunum í útvarpinum.

Deyvatulkingin av Degi og Viku verður gjørd uttan fyri húsið. Eisini verða fríyrkisfólk brúkt í sambandi við framleiðslu av sjónvarpssendingum, eitt nú alt tilfarið til ungdómsmiðilin biit.fo. Kringvarpið hevur samanumtikið góðar royndir við at keypa tænastur frá fríyrkisfólki til programmframleiðslu.

**Partur av tilbúgvingini**

Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnumrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har tørvur er á tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið eftir eina lítla løtu kann varpa út, um eitthvørt álvarsamt hendir.

Kringvarpið hevur nakrar ferðir sent tilbúgvingarútvarp í sambandi við ódnarveður. Sent verður út á kvøldið og náttina við.

**Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.**

– úr kringvarpslógini

# Ein neyðug ráðstevna

Stóra miðlaráðstevnan "Miðlar á vegamóti" í Norðurlandahúsinum í august, sum Kringvarpið skipaði fyri saman við Dimmalætting, Norðlýsinum og Sosialinum, setti sjóneykuna á avbjóðingar og loysnir í føroyska miðlalandslagnum.

Tað hevur leingi staðið øllum greitt, at føroysku miðlarnir standa á einum vegamóti. Minkandi inntøkur og vaksandi útreiðslur hótta fíggjarliga grundarlagið undir privata blaðmarknaðinum og almenna public service-miðilinum. Samstundis eru bæði staðbundnir miðlar og tjóðarmiðlar undir vaksandi trýsti í alheimsgjørda miðlalandslagnum.

Á ráðstevnuni kom m.a. fram, at:

- Yvir 100 størv eru horvin úr Dimmalætting, Sosialinum og Kringvarpinum tey seinastu 15 árini
- Altjóða rákið, har fólk vraka tíðindasendingar, tekur dik á seg
- Álitið á public service-miðlar er framvegis stórt
- Privatir miðlar í Føroyum hava munandi minni pengar at arbeiða við pr. íbúgva samanborið við privatar miðlar í størru Norðurlondunum
- Stór ónøgd er við føroysku miðlastuðulsskipanina
- Føroysku lýsingapengarnir fara av landinum
- Broyttu miðlavanarnir hótta savningarmegina í føroyska samfelagnum

Tað finst onki quick fix, sum kann loysa avbjóðingarnar í miðlalandslagnum. Í staðin er tørvur á nýhugsan yvir ein breiðan kamb. Men nýhugsan fremist best innan tryggar karmar; tí mugu vit fáa eina breiða fjølmiðlasemju, sum røkkur tvørtur um valskeið.

Hesi viðurskifti hava stóra ávirkan á okkara fólkaræði og mentan. Ein breið semja má tí byggja á ta sannroynd, at miðlapolitikkurin er partur av mentanarpolitikkinum. Miðlarnir eru almannagagnligir ágóðar og kunnu tí ikki rekast eftir marknaðartreytum aleina. Ynskja vit eitt sterkt miðlalandslag, so mugu atlit takast bæði at fíggjarliga grundarlagnum og fyritreytunum fyri menning innan journalistikk og tøkni.

Miðlarnir mugu eisini í størri mun líta inneftir. Átrokandi arbeiðið at røkka ymsu føroysku málbólkunum í talgilda tilboðsmeldrinum setur nýggj krøv til miðlaleiðslurnar. Her mugu vit tó ongantíð gloyma, at kravið um dygdargóðan og viðkomandi journalistikk eigur at vera í miðdeplinum. Á ráðstevnuni kom fram, at álitið á føroyskum miðlum framvegis er lutfalsliga høgt. Tað má ikki fara fyri skeytið.

**Ivan Hentze Niclasen**

## Hesi løgdu fram á ráðstevnuni

- Mark Blach-Ørsten, professari, RUC
- Mads Brandstrup, stjóri, Danske Medier
- Valgerður Anna Jóhannsdóttir, assistant professor, Háskóli Íslands
- Eirikur Lindenskov, stjóri, Sosialurin
- Jóhann Lutzen, stjóri, Norðlýsið
- Ivan Hentze Niclasen, stjóri, Kringvarp Føroya
- Lars Nord, professari, MittUniversitetet
- Signe Ravn-Højgaard, adjunktur, Grønlands Universitet
- Keld Reinicke, miðlaráðgevi og fyrrv. programmleiðari á Tv2
- Heini í Skorini, lektari, Fróðskaparsetur Føroya
- Sveinur Tróndarsson, blaðstjóri, Dimmalætting



KRINGVARP
FØROYA